# Pávin dottin



Benedikt XVI pávi er innlagdur á eitt sjúkrahús í italska býnum Aosta. Ovastin hjá katólsku kirkjuni datt í morgun í summarhúsi sínum í Les Combes í Aostadalinum og fekk skaða í økulin. 82-ára gamli pávin varð innlagdur til eygleiðan, men kláraði sjálvur at halta inn á skaðastovuna saman við skrivara sínum, George Gänswein. Sambært talsmanninum hjá Vatikaninum, Federico Lombardi, er ikki talan um nakað álvarsligt. Afturhalds sinnaði týski Joseph Ratzinger hevur staðið á odda fyri teimum 1,13 milliardunum katolikkum um allan heim síðani apríl 2005, skrivar boersen.dk.

# Ikki fleiri ferjuferðir

Í USA hevur rúmdarumsitingin NASA gjørt av, at fyribils verða ikki fleiri rúmdarferjur skotnar út í rúmdina. Avgerðin er tikin, eftir at nøkur petti duttu av rúmdarferjuni Endeavour, tá hon bleiv skotin út fyrrakvøldið. Kanningar hjá NASA hava víst, at talan var um nøkur petti av bjálvingini, sum er uttan á brennievnitangunum. John Shannon hjá NASA sigur við tíðindastovuna AP, at tey stúra ikki fyri Endeavor og teimum sjey rúmdarfólkunum umborð á ferjuni, men at tað er neyðugt at fáa staðfest, hvat hendi, aðrenn tann næsta rúmdarferjan verður send avstað.

# Eiði 2 boðið út



*Arbeiðið uppá Eiði 2 Norður verður liðugt seint í heyst, og so er klárt at fara undir fyrireikingarnar til Eiði 2 Suður. Samanlagt kemur henda verkætlanin at økja um vatnorkuna hjá SEV við 16 mió. kilowatt-tímun*

*Mynd: SEV*

**Fimm byggifeløg eru við í innbodnari lisitasjón um Eiði 2 Suður**

TÍÐINDASKRIV

Arbeiðið uppá Eiði 2 Norður verður liðugt seint í heyst, og so er klárt at fara undir fyrireikingarnar til Eiði 2 Suður. Samanlagt kemur henda verkætlanin at økja um vatnorkuna hjá SEV við 16 mió. kilowatt-tímun.

Verkætlanin Eiði 2 Suður hjá Elfelagnum SEV verður nú boðin út. Bygginevndin, sum nevndin í SEV hevur sett at hava eftirlit við arbeiðnum, hevur gjørt av at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitasjón millum fimm norðurlendsk byggifeløg.

Føroysku byggifeløgini Articon og J&K Petersen eru við sum hvør sín partur av tveimum av teimum innbodnu samtøkunum.

Útbjóðingartilfarið verður sent út í næstu viku, og væntandi verður støða tikin til tey til ta tíð innkomnu tilboðini einaferð í heyst.

**16 mió. kw-tímar aftrat**

Arbeiðið fevnir um at gera ein 8,6 kilometrar langan tunnil við tilhoyrandi áarinntøkum úr Skálagjógv, omanfyri Norðskála, suður til Blásenda, norðanfyri Veðranes.

Eiði 2 Suður er framhald av Eiði 2 Norður, sum verður liðug seint í heyst. Byggifeløgini MT Højgaard og J&K Petersen hava í felag staðið fyri boriarbeiðnum, meðan byggifelagið Kanjon hevur gjørt áarinntøkini.

Eiði 2 Norður kostar umleið 65 mió. kr.

Samanlagt fer Eiði 2 verkætlanin at økja um vatnorkuna hjá SEV við umleið 16 miljónum kilowatt-tímum aftrat teimum 40 miljónunum, sum Eiðisverkið framleiðir frammanundan.

**Byrja næsta summar**

Roknað verður við, at klárt verður at fara undir boriarbeiðið næsta summar, og eftir ætlanini skal arbeiðið vera liðugt í 2013.

Í sambandi við útbyggingina skal eisini ein triðja turbina setast upp á Eiðisverkinum.

SEV hevur við góðkenning frá Fíggjarmálaráðnum gjørt avtalu við Íleggingargrunnin fyri Føroyar um at læna 218 mió. kr. úr grunninum til fremjanina av allari Eiði 2-verkætlanini.

Í bygginevndini fyri Eiði 2 eru: Steinbjørn O. Jacobsen, formaður, Jákup Suni Lauritsen, næstformaður, Pauli T. Petersen og Hákun Djurhuus, stjóri í SEV.

# Summarkapping fyri børn



**Býarbókasavnið skipar fyri summarkapping fyri børn**

TÍÐINDASKRIV

Tað er stuttligt at lesa, og nú kanst tú eisini fáa nakað burturúr við at siga øðrum frá tínum lesiupplivingum.

Send okkum eitt bókaummæli, og tú ert við í lutakastinum um góðar vinningar.

Øll børn, sum fara í 2.-10. flokk eftir summarfrítíðina, kunnu vera við í átakinum.

Hevur tú lisið eina ordiliga góða bók, sum tú heldur, onnur eisini áttu at lisið, ella hevur tú lisið eina, sum er so vánalig, at onnur børn mugu ávarast móti henni, so er bara at senda inn.

Tað ger tað sama, um bøkurnar, tú ummælir, eru á føroyskum, donskum ella kanska á enskum. Tað er loyvt at senda fleiri ummælir.

Freistin at lata ummælir inn er 16. august 2009, og 20. august kasta vit lut um tríggjar vinningar. Trý børn vinna hvørt sítt gávukort á 300 kr. í H.N. Jacobsens Bókhandli. Vinnararnir fáa boð frá okkum og verða harumframt kunngjørdir á www.bbs.fo.

Gloym ikki at skriva eina teldupostadressu, so vit kunnu fáa fatur á tær, um tú ert ein av teimum hepnu vinnarunum.

Far inn á www.bbs.fo, skriva ummælið og send! – Ella kom inn á bókasavnið og fá eitt útfyllingarskjal.